# Býráðið

**Dagfesting:** 30.05.2024 kl. 19:00
**Málnr.:** 22/00084

Nevndarlimir: Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, David Andreasen, Edva Jacobsen, Eivin Breiðaskarð, Gudny Vang, Magni Jøkladal, Ólavur Larsen

Varalimir: Bergtóra Cederiusdóttir fyri Sonna á Horni

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Jóanis Erik Køtlum

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 18/24 | 24/00249-1 | Ársroknskapur 2023 |
| 19/24 | 22/00155-66 | Nýggi køkurin verður munandi dýrari enn avsetingin í fíggjarjattanini |
| 20/24 | 24/00193-1 | Nýggjur bilur til vegadeildina |
| 21/24 | 20/00510-33 | Broyting av byggisamtykt fyri sethúsaøki á Kambsdali til vinnuøki við serligari flokking. |
| | | |
| **Til kunning** | | |
| | | |

1

**Til støðutakan**

**18/24**
**24/00249-1 Ársroknskapur 2023**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 27.05.2024 | 27/24 |
| 2 Býráðið | 30.05.2024 | 18/24 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Fíggjarnevnd |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Fuglafjarðar kommuna hevur, tann 22 mai 2024, móttikið uppskot til grannskoðan roknskap fyri 2023 frá grannskoðanarvirkinum Januar<br>.<br>Ársroknskapurin hjá Fuglafjarða kommunu fær eina átekning uttan fyrivarni ella ískoytisupplýsingar og mett verður, at ársroknskapurin gevur eina rætta mynd av kommunnunar ognum og skyldum, fíggjarligu støðu og rakstrarúrsliti.<br><br>Yvirskipað kann sigast, at fíggjarárið 2023 royndist rímiliga væl hjá Fuglafjarðar kommunu við einum samlaðum gjaldførisúrsliti(RLÚ) uppá 15,8 mió. kr., sum serliga skyldast øktu inntøkurnar frá kommunu- og partafelagsskatti og eisini varðisligu fíggjarætlanin, sum varð løgd við ársbyrjan. Harvið er nettoskuldin komin niður á 71% av einari álíkning við ársenda í 2023, móti 120% og 97% í ávikavist 2021 og 2022.<br><br>Í grannskoðaraprotokollini verður eisini víst á lutfalsliga stórar meirnýtslur á fleiri økjum. Grannskoðarin heitir á býráð og umsiting at endurskoða mannagongdir við ger og uppfylgjan av fíggjar- og eykafíggjarætlanum, soleiðis at betri samsvar fæst millum fíggjarætlan og staðfest roknskaparskjøl.<br><br>Í samband við gjøgnumgongd av tryggingum er grannskoðanin komin fram á, at tað eru nakrir tryggingarskaðar sum ikki eru gjørdir upp. Heitt verður á fyrisitingina um at skipa mannagongdirnar soleiðis, at tryggingarskaðar o.a. verður gjørt upp so skjótt sum til ber.<br><br>Høvuðstølini eru samanumtikið hesi:<br>Raksturin uttan íløgur var uppá 82,3 mió. kr. ímóti einari játtan uppá 81,2 mió. kr.. svarandi til eina meirnýtslu uppá 1,1 mió. kr. |

2

Økini §2, §3 og §5 hava eina minninýtslu uppá tilsamans 1,2 mió. kr. meðan hini økini hava samanlagt eina meirnýtslu uppá 3 mió. kr. Av hesum er tað §6 teknisk mál, sum einsamalt hevur góð 75% av meirnýtsluni.

| Rakstur uttan fløgur | Ætlan 2023 | Rakstur 2023 | Munur |
|---|---|---|---|
| §1 Kommunal fyrisiting | 13.080.900 | 13.413.503 | 332.603 |
| §2, Almanna & Heilsumál | 28.917.757 | 28.454.920 | -462.837 |
| §3, Børn og Ung | 20.577.940 | 20.035.511 | -542.429 |
| §4, Undirvísing | 4.675.000 | 5.080.300 | 405.300 |
| §5, Mentan og frítíð | 7.328.322 | 7.097.057 | -231.265 |
| §6, Teknisk mál | 9.125.000 | 11.389.207 | 2.264.207 |
| §7: Kommunal virki | -2.528.000 | -3.178.550 | -650.550 |
| | **81.176.919** | **82.291.947** | **1.115.028** |

Meirnýtslan á § 1 stavar í størsta mun frá útreiðslum til sakarmál , sáttmálar og kunningartøkni.

Fíggjarliga tyngsta rakstrarøkið hjá kommununi er §2 Almanna og heilsumál. Her er útreiðslan til Samstarvið Nánd á 22,2 mió. kr., íroknað 1.6 mió. kr. í leiguinntøku. Afturberingin frá landinum var í 2023 19,4 mió. kr. Kommununar partur er sostatt 2,8 mió. kr. móti 2.4 mió. kr. í 2022.

Útreiðslan til §3 Børn og Ung varð 20 mió. kr. Hetta var góðar 500 t.kr. lægri enn ætlað og stavar hetta lutvíst frá hægri brúkaragjøldum og minni keyp.

Økið 4, hevur eina meirnýtslu á 405 t.kr. Meirnýtslan stavar einamest frá keyp av undirvísingartilfari.

§ 5 Mentan og frítíð hevur eina samlaða minninýtslu á 231 t.kr.

§ 6 hevur eina meirnýtslu á 2,3 mió. kr. Flestu rakstrarstøð á tekniska økinum hava ein meirnýtslu tó serliga er tað vatnveitingin, gøtuljósini og kavaruddingin, har útreiðslurnar vóru hægri enn væntað.

Á økið 7 Kommunal virki var væntað ein nettoinntøka á 2,5 mió. kr. Tá avtornaði lógu 3,1 mió. kr. eftir og var sostatt talan um áleið 600 t.kr. meira enn ætlað og er økta virksemið á havnini orsøk til hetta.
Lønarútreiðslurnar í árinum hava verið 48.794 t.kr. móti 46.811 í 2022.
Grannskoðanin ger vart við, at smb. §41 í kommunustýrislógini er ásett, at kommunan er játtanarmyndugleiki og farast kann ikki undir arbeiði uttan at játtan er tøk. Somuleiðis verður gjørt vart við, at talan er um lutfalsliga stórar meirnýtslur á fleiri økjum.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| Rakstur, íløgur | Ætlan 2023 | Rakstur 2023 | Munur |
|---|---|---|---|
| §1, kommunal fyrisiting | 400.000 | 402.811 | 2.811 |
| §2, Almanna & Heilsumál | 510.000 | 589.417 | 79.417 |
| §3, Børn og Ung | 134.000 | 5.136 | -128.864 |
| §4, Undirvísing | 500.000 | 679.742 | 179.742 |
| §5, Mentan og frítíð | 1.200.000 | 1.284.165 | 84.165 |
| §6, Teknisk mál | 13.523.000 | 15.165.972 | 1.642.972 |
| §7: Kommunal virki | -540.000 | 313.931 | 853.931 |
| | **15.727.000** | **18.441.174** | **2.714.174** |

Íløgurnar í árinum hava verið 18,4 mió. kr. ímóti eini ætlan á 15,7 mió.kr. Talan er tískil um eina meirnýtslu á 2.7 mió. kr. Einans økið 3 hevur eina minninýtslu á áleið 130 t.kr. Øll hini økini hava meirnýtslu. Á rakstrarstaðS 347 (FK) er meirnýtslan 1 mió. kr. eins og sølan av grundstykkum var lægri enn væntað í 2023.

Inntøkurnar hjá Fuglafjarðar kommunu gjørdist 15,5 mió hægri enn væntað, sí niðanfyri:

| Skattainntøkur | Ætlan 2023 | Rakstur 2023 | Munur |
|---|---|---|---|
| Húsaleiguskattur | -50.000 | -18.450 | 31.550 |
| Kommunuskattur | -71.813.156 | -78.287.539 | -6.474.383 |
| Partafelagsskattur | -13.500.000 | -23.306.086 | -9.806.086 |
| Skattur av kapitaleftirløn | -16.203.000 | -16.878.309 | -675.309 |
| Skattur av DIS & FAS | -2.496.000 | -2.496.048 | -48 |
| Rentur, netto | 3.100.000 | 4.495.813 | 1.395.813 |
| | **-100.962.156** | **-116.490.618** | **-15.528.462** |

| | Rakstur 2023 | Rakstur 2022 | Munur |
|---|---|---|---|
| **Rakstur íalt** | **82.291.947** | **73.581.011** | **-8.710.936** |
| §1. Kommunal fyrisiting | 13.413.503 | 12.562.723 | -850.780 |
| §2. Almanna & heilsumál | 28.454.920 | 26.464.598 | -1.990.322 |
| §3. Børn og ung | 20.035.511 | 18.401.250 | -1.634.261 |
| §4. Undirvísing | 5.080.300 | 4.521.647 | -558.653 |
| §5. Mentan og frítíð | 7.097.057 | 6.297.756 | -799.300 |
| §6. Teknisk mál | 11.389.207 | 7.816.154 | -3.573.053 |
| §7. Kommunal virki | -3.178.550 | -2.483.117 | 695.433 |
| **Rakstur íalt** | **82.291.947** | **73.581.011** | **-8.710.936** |
| **Íløgur íalt** | **18.441.174** | **23.769.217** | **5.328.042** |
| §1. Kommunal fyrisiting | 402.811 | -1.844.438 | -2.247.249 |
| §2. Almanna & heilsumál | 589.417 | 1.023.723 | 434.306 |
| §3. Børn og ung | 5.136 | 558.395 | 553.259 |
| §4. Undirvísing | 679.742 | 7.655.732 | 6.975.990 |
| §5. Mentan og frítíð | 1.284.165 | 154.083 | -1.130.083 |
| §6. Teknisk mál | 15.165.972 | 14.920.001 | -245.971 |
| §7. Kommunal virki | 313.931 | 1.301.721 | 987.790 |
| **Íløgur íalt** | **18.441.174** | **23.769.217** | **5.328.042** |
| **§ 1. - § 7. íalt** | **100.733.122** | **97.350.228** | **-3.382.894** |
| **§ 20. Inntøkur** | **-116.490.618** | **-111.347.952** | **5.142.666** |
| **Gjaldføri frá rakstri** | **-15.757.497** | **-13.997.724** | **1.759.772** |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | |
|---|---|
| | Raksturin er hækkaður við 8,7 mió. kr., sammett við 2022.<br>Íløgurnar eru lækkaðar við 5,3 mió. kr..<br>Inntøkurnar er í tíðarskeiðnum øktar 3,3 mió. kr. og samanlagt gjørdis gjaldførisúrslitið frá rakstrinum (RLÚ) 15,8 mió. kr. í mun til 14 mió. kr. í 2022.<br>Við árslok 2023 er nettolániskuldin fallin frá 0,97 við ársbyrjan til 0,71.<br>Undir eventualskyldum vísir grannskoðanin á, at kommunan er saksøkt eftir endurgjaldi uppá 2,3 mió. kr. frá Faroe Agency. Málið er ikki liðugt avgreitt enn.<br>Grannskoðanarprotokollin verður latin býráðslimunum í stórsta trúnaði saman við málinum. |
| ENT | Viðgerð av grannskoðanarprotokol í samband við ársroknskap 2023 |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>• Møgulig fylgiskjøl<br>• Kommunustýrislóg §38 stk.3 4)Fíggjarnevnd hevur ábyrgd av at leggja grannskoðaðan roknskap, saman við grannskoðanarfrágreiðing fyri kommunustýrið til góðkenningar og undirskrivingar<br>• Kommunustýrisskipan §17 4) Fíggjarnevndin hevur ábyrgd av at leggja grannskoðaðan roknskap fyri býráðið til góðkenningar og undirskrivingar og 5) at leggja grannskoðanarfrágreiðing fyri býráðið til viðgerðar,<br>• **Møgulig fylgiskjøl**<br>• Grannskoðanarprotokol frá grannskoðanarvirkinum Januar<br>• Ársfrásøgn 2023 frá grannskoðanarvirkinum Januar |

**Viðgerð**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Nei | Nei |
| | Umsitingarligar | Ja | Ja |

| | |
|---|---|
| Tilmæli | Mælt verður til at fíggjarnevndin viðgerð roknskapin fyri 2023 saman við grannskoðanarprotokollini og leggja hesi fyri býráðið til góðkenningar. |
| Dagf | 24. mai. 2024 |

5

**<u>Fíggjarnevndin 27. maj 2024:</u>**
Fíggjarnevndin hevur viðgjørt roknskapin 2023 og mælir býráðnum til at góðkenna hann.

**<u>Býráðið 30. maj 2024:</u>**
Býráðið tók einmælt undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini og góðkendi ársroknskapin 2023 fyri Fuglafjarðar kommunu.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

## 19/24
## 22/00155-66 Nýggi køkurin verður munandi dýrari enn avsetingin í fíggjarjattanini

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 17.04.2024 | 10/24 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.04.2024 | 22/24 |
| 3 Fíggjarnevndin | 30.04.2024 | 23/24 |
| 4 Býráðið | 02.05.2024 | 14/24 |
| 5 Fíggjarnevndin | 27.05.2024 | 32/24 |
| 6 Býráðið | 30.05.2024 | 19/24 |

### Tilráðing

| Til viðgerðar í | Sosiala nevnd |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | **18.04.24**<br>Útbyggingin av nýggja køkinum á Vesturstovu eru nú komin inn, og vísir tað seg, at tað fer at kosta munandi meira enn avsetingin í fíggjarjáttanini at gjøgnumføra verkætlanina. Sosiala nevnd hevur viðgjørt málið, og sendir tað víðari til fíggjarnevndina við ynski um eina eykajáttan.<br><br>**17.04.24**<br>Tilboðini fyri um og útbyggingina av nýggja køkinum á Vesturstovu eru nú komin inn, og vísir tað seg, at útreiðslan til nýggjan køk er munandi hægri enn avsetingin fyri inniverandi ár.<br><br>Upprunaliga var biði um 900.000 kr. til nýggjan køk. Tá bleiv verkætlanin steðga, tí tað vísti seg, at tað ikki var møguligt at gjøgnum føra verkætlanina innanfyri fíggjarkarmin.Tá væntaðu vit, at tað fór at kosta uml. 1,5 mill.<br>Tá ið uppskotið bleiv lagt fyri aftur, var útgangsstøðið tær tekningar og forarbeiðið sum fyrilá frá fyrverandi verkætlan. Tó vóru onkrar broytingar gjørdar, og uppskotið bleiv prístalstegulera. Tí bleiv mett, at tørvur var á 2,2 mill. Til nýggjan køk.<br><br>Tilboðini sum eru komin inn vísa, at samlaða íløgan fyri nýggjan køk fer at verða uml. 5,5 mió. Ein stórur partur av prísmuninum stavar ikki frá |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | |
|---|---|
| | sjálvum køkinum, men frá ymiskum avleiddum útreiðslum, sum neyðugt er at taka støðu til.<br><br>Høvuðsfrágreiðingarnar til tann stóra prísmunin eru:<br>• streyminnføringin til Vesturstovu er ov lítil. Nýggj streyminnføring við nýggjum kaðali, neyðagregati og nýggjari eltalvu kemur at kosta uml. 1. millión – hettar var ikki við í upprunaligu verkætlanini. Tað kann vera, at onkrar av hesum útreiðslum kunnu forhandlast, men tað er óvist, hvussu nógv.<br>• Onki var sett av til óvæntað í upprunaligu verkætlanini – í nýggja uppskotinum eru settar kr. 500.000 til óvæntaðar útreiðslur<br>• Í upprunaliga uppskotinum var frástøðan millum loft og gólv ov lítil. Hettar er broytt í nýggja uppskotinum, og nakrir kvadratmetrar eru lagdir afturat<br>• Í upprunaliga uppskotinum bleiv verandi betonggólv ikki broytt. Hettar vísir seg at vera neyðugt, tí tað ofta er kloaklugtur í núverandi køki, og rørini liggja undir betonggólvinum í útbygninginum. Gólvið má tí brótast upp.<br>• Tilboðið frá Heildarverk er nakað væl hægrið enn upprunaliga tilboðið frá TM-Bygg. Men ein gjøgnumgongd av tilboðunum vísir, at tilboðið frá Heildarverk nokk er meira realistiskt. T.d.meta teir, at el-arbeiðið fer at kosta uml. 450.000 kr. TM-byg mettið, at tað fór at kosta uml. 60.000.<br>• Uprunaliga tilboðið er uppá ein vanligan køk við vanligum hvítvørðum. Núverandi tilboð er uppá ein industrikøk við industriovni og industripannu, og køkselementini eru til intustrikøk.<br>• Tað eru stórir trupulleikar við ventilatiónsskipanini á Vesturstovu. Skipanin er gjøgnumgingin av einum fakmanni og tær rættingar sum kunnu gerast eru gjørdar. Hettar loysir tó ikki trupulleikan, tí skipanin er keypt til upprunaliga bygningin, og bleiv alt ov lítil, tá ið Vesturstova bleiv útbygtt. Neyðugt er við nýggjari stýrisskipan, og tað gevur mest meining at keypa hesa skipan, meðan atgongd er til lofti, har skipanin skal standa. Vit hava ikki fingið endaligan prís uppá nýggja skipan, men væntandi kostar ein tílík skipan 3 – 400.000 kr.<br>• Upprunaliga fíggjarjáttanin var uttan mvg. Núverandi játtan er við mvg.<br><br>Upprunaliga tilboðið og nýggja tilboðið er lagt við sum skjøl, og tekningar av køkinum eru eisini lagdar við. Starvsfólk frá teknisku deild luttaka á fundinum, og greiða meira gjølliga frá avbjóðingunum.<br><br>**30.04.24** |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | |
|---|---|
| | Umsitingin hevur gjøgnumgingið verkætlanina, saman við teknisku deild og er komin fram til at tað bert eru uml. 150 tkr. at spara, sum er minni útreiðsla til kaðalføring, um Vesturstova skal fáa ein løggildan køk. Tað eru tó nakrar útreiðslur sum ikki hava beinleiðis við køkin at gera og kunnu meirútreiðslurnar uppá uml. 3.000 tkr. býtast á hesi øki:<br>1. Príshækkingar, byggipláss og tillagingar 500 tkr.<br>2. EL-arbeiði ikki við í upprunaligu verkætlanini 500 tkr.<br>3. Nýgg EL-innføring og EL-kaðal 800 tkr.<br>4. Neyðstreymsannlegg 125 tkr.<br>5. Dagførd ventilatión 400 tkr.<br>6. Fyribils køkur í kjallara 175 tkr.<br>7. Óvæntaðar útreiðslur 500 tkr.<br><br>**02.05.2024**<br>Dagføring og útbyggingin av køkinum á Vesturstovu, sum er neyðugt um myndugleikakrøvini skulu haldast, vísir seg at kosta væl meir enn upprunaliga avsett (5,5 mió. kr. í mun til upprunaliga 2,3 mió. kr.) . Stórur partur av hesum meirkostnaði hevur ikki beinleiðis við køkin at gera, men eru fortreytir fyri at stovnurin hevur passandi streymveiting og passandi luftskifti.<br><br>Samanumtikið kann meirkostnaðurin gerast soleiðis upp:<br>1. Príshækkingar, byggipláss og tillagingar 500 tkr.<br>2. EL-arbeiði ikki við í upprunaligu verkætlanini 500 tkr.<br>3. Nýgg EL-innføring og EL-kaðal 800 tkr.<br>4. Neyðstreymsannlegg 125 tkr.<br>5. Dagførd ventilatión 400 tkr.<br>6. Fyribils køkur í kjallara 175 tkr.<br>7. Óvæntaðar útreiðslur 500 tkr.<br><br>Málið hevur verið viðgjørt í sosialu nevnd og tvær ferð í fíggjarnevndini, sum taka undir við, at verkætlanin verður givið eykajáttan. |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Tilboðini uppá nýggjan køk til Vesturstovu eru nú komin inn. Um- og útbyggingin verður munandi dýrari enn avsetingin á fíggjarjáttanini fyri inniverandi ár. |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tilíkt**<br>Kommunustýrislógin og kommunustýrisskipanin fyri Fuglafjarðar kommunu.<br>• **Møgulig fylgiskjøl**<br>Vesturstova – køkur tilboð<br>Nøgdarlisti samanlíkning |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| Viðgerð | | | |
|---|---|---|---|
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | x | |
| | Umsitingarligar | | |
| Tilmæli | **18.04.24**<br>Mælt verður til, at fíggjarnevndin tekur støðu frá Sosialu nevnd um eykajáttan til nýggja køkin.<br><br>**17.04.24**<br>Mælt verður til, at sosiala nevnd tekur kunningina til eftirtektar, og tekur støðu til, hvussu arbeiðast skal víðari við verkætlanini.<br><br>**30.04.24**<br>Mælt verður til at fíggjarnevndin tekur støði til at geva ein eykajáttan til rakstrarstað 265 "Vesturstova íløgur" uppá 3.000 tkr., og hvussu hendan í so fall skal fíggjast.<br><br>**02.05.24**<br>Mælt verður býráðnum til við fyrstu viðgerð at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini um at veita verkætlanini 2.800 tkr. í eykajáttan, har 800 tkr verða fluttar frá rakstrarstað 637 "Kirkjugarðar íløgur" meðan restin 2.000 tkr. verður fíggjað við innistandandi.<br><br>**27.05.24**<br>Mælt verður fíggjarnevndini til at heita á býráðið um við aðru viðgerð at samtykkja tilmælið frá 02.05.24 | | |
| Dagf | 16.04.2024 og 18.04.2024 | | |



**<u>Sosiala nevnd 17. april 2024:</u>**
Sosiala nevnd tekur undir við projektuppskotinum til nýggjan køk. Mett verður ikki, at køkurin skal broytast til ikki at vera industrikøkur, tí tað er ein framtíðartrygging. Sosiala nevnd sendir málið víðari til fíggjarnevndina, við eini umbøn um eini eykajáttan til verkætlanina.

**Fíggjarnevndin 18. april 2024:**
Fíggjarnevndin heitir á teknisku deild og sosialu deild um, at endurskoða tekningar av køkinum við tí endamáli, at fáa kostnaðin niður uttan, at tað gongur út yvir tær veitingar køkurin skal nýtast til.

**Fíggjarnevndin 30. april 2024:**
Fíggjarnevndin tekur einmælt undir við, at veita 2.800 tkr. í eykajáttan, við at minka upphæddina til óvantað við 200 tkr. í mun til tilmælið 30.04.2024. Um tað vísir seg, at hetta ikki heldur so er møguleiki at útseta keyp av neyðstreymsaggregati til komandi ár. Fíggjarnevndin mælir til, at hetta verður fíggjað við at flyta 800 tkr. frá rasktrarstað 637 «Kirkjugarðar (íløgur)» og restina av innistandandi.

**Býráðið 02. maj 2024:**
Býráðið tók einmælt undir við tilmælinum um eykajáttan frá fíggjarnevndini við 1. viðgerð og beinir málið víðari til 2. viðgerð.

**Fíggjarnevndin 27. maj 2024:**
Fíggjarnevndin mælir býráðnum til at góðkenna eykajáttanina við aðru viðgerð.

**Býráðið 30. maj 2024:**
Býráðið tók í aðru viðgerð einmælt undir við eykajáttanini til Vesturstovu.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**20/24**
**24/00193-1 Nýggjur bilur til vegadeildina**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 18.04.2024 | 14/24 |
| 2 Fíggjarnevndin | 30.04.2024 | 24/24 |
| 3 Býráðið | 02.05.2024 | 15/24 |
| 4 Fíggjarnevndin | 27.05.2024 | 31/24 |
| 5 Býráðið | 30.05.2024 | 20/24 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Tekniska nevnd |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Fuglafjarðar kommuna hevur sett 550tús krónur av til nýggjan bil á vegadeildini. Talan er um nýggjan «Karlsvogn», sum er í sera ringum standi og kostar kommununi fleiri 10tús um árið. Tekniska deild hevur fingið inn 3. tilboð inn.<br>Tekniski leiðarin og átaksleiðarin hava haft ein fund saman við arbeiðsformanninum um at raðfesta innkomnu tilboðini.<br>Raðfestingarnar frá vegadeildini vóru hesar:<br>1. Iveco: Gundgevingingin varð at talan varð um ein nýggjan Karlsvogn. Hesin bilurin erstattar Karlsvognin. Bilurin krevur ikki stóra koyrikortið. Hevur góðan og stóran krana, nøktar tørvin sum sum Karlsvognurin ger í dag til lyktapelar, flaggstengur o.líkn. Hevur alla útgerðina sum ynski er um.  Totalvektin er 3,5t. Bilvektin er 2220kg, kranin vigar 400kg, tvs. at hann kann lasta 880kg. Hevur 8 trins gearkassa og intellegenta bremsu / retardara funktión. Bilurin er góðkendur til at sleipa 3500 kg. Kommunan eigur ein vogn sum vit kunnu sleipa maskinur til og frá arbeiðsstøðum.<br>2. Renault Master: Grundgevingin varð, at hesin bilurin fær eitt 2. pláss av tí at hann krevur stóra koyrikorti. Totalvektin er 4,5t. Bilvektin er 2240kg, kranin vigar 500kg, tvs. at hann kann lasta 1360kg<br>3. Ford Transit: Grundgevingin er at hann hevur ov lítlan motor,<br><br>**02.05.2024**<br>Nú tilboð eru komin uppá nýggjan bil til vegadeildina, vísir tey seg øll at liggja omanfyri avsettu upphæddina uppá 550 tkr. Sambært teknisku deild og nevnd, so kostar tann bilurin ið best líkur krøvini |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

<table>
<tr><td></td><td colspan="3">til vegadeildina 140 tkr. meir enn avsett. Tekniska nevnd og fíggjarnevndin taka undir við at peningurin verður játtaður.</td></tr>
<tr><td>Orsøk til at málið verður viðgjørt</td><td colspan="3">Peningur er settur av til nýggjan bil til vegadeildina, sum skal erstatta sonevnda “karlsvognin”. Peningaupphæddin er 550tús krónur. Øll innkomin tilboð eru uttan mvg og eru dýrari enn játtanin.</td></tr>
<tr><td>Grundarlag</td><td colspan="3">• Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>• Kommunustýrislógin.<br>• Tilboð og skjøl til Ford Transit<br>• Tilboð og skjøl Iveco<br>• Tilboð og skjøl Renault Master</td></tr>
<tr><td colspan="4">Viðgerð</td></tr>
<tr><td rowspan="3">Tekstur íð lýsir loysn</td><td>Avleiðingar</td><td>Stuttíðar</td><td>Langtíðar</td></tr>
<tr><td>Fíggjarligar</td><td>x</td><td></td></tr>
<tr><td>Umsitingarligar</td><td>x</td><td></td></tr>
<tr><td>Tilmæli</td><td colspan="3">Tekniski leiðari mælir til at viðgerða tilboðini, taka støðu til hvønn bil Fuglafjarðar kommuna skal keypa.<br><br>Tilmæli til Fíggjarnevndina 30-04-2024<br>Mælt verður fíggjarnevndini til at taka undir við tilmælinum frá teknisku nevnd um útreiðsluneutralara eykajáttan har 140 tkr.verða fluttar frá rakstrarstað 671 “Íløga vegir” til rakstrarstað 691 “Íløga bilar-maskinur.<br><br>Tilmæli til Býráðið<br>Mælt verður til at býráðið fylgir tilmælinum frá teknisku nevnd og fíggjarnevndini um, at játta 140 tkr. til rakstrarstað 691 “Íløga bilar – maskinur” og at hetta verður fíggjað við at flyta peningin frá rakstrarstað 671 “Íløga vegir”.<br><br>Tilmæli til Fíggjarnevndina 27-05-2024<br>Mælt verður fíggjarnevndini til heita á býráðið um, at samtykkja tilmælið frá fíggjarnevndini 30-04-2024 óbroytt, við aðru viðgerð.</td></tr>
<tr><td>Dagf</td><td colspan="3">15.04.2024</td></tr>
</table>

**Tekniska nevnd 18. apríl 2024:**
Útgangsstøði er at Fuglafjarðar kommuna hevur sett pening av til ein nýggjan Karlsvogn. Og tey innkomnu tilboðini fara øll yvir játtanina. Tvey av tilboðunum hava verið tala um, og Tað eru Iveco og MAN TGE. Sonni, sum er bilkønur, metur at Iveco bilurin er tann sum passar best til tørvin. Hann kann trekkja 3,5t, er bakhjulstrektur, og hevur alla útgerðina sum ynski er um. MAN TGE er eisini ein góður bilur, men kann trekkja 3,0t, forhjulstrektur, og manglar nakað av tí útgerðini sum vegadeildin ynskir.
Tí mælir tekniska nevnd til at keypa Iveco bilin. At finna væntandi fígging á øki 6, RS671 íløga vegir.

**Fíggjarnevndin 30. apríl 2024:**
Fíggjarnevndin tekur einmælt undir við at veitt verður útreiðsluneutral eykajáttan uppá 140 tkr., sum verður flutt frá RS 671 «Íløga vegir» til RS 691 «Íløga bilar – maskinur».

**Býráðið 02. maj 2024:**
Býráðið tók einmælt undir við tilmælinum frá teknisku nevnd og fíggjarnevndini um útreiðsluneutrala eykajáttan við 1. viðgerð og sendir málið víðari til 2. viðgerð.

**Fíggjarnevndin 27. maj 2024:**
Fíggjarnevndin mælir býráðnum til at góðkenna eykajáttanina við aðru viðgerð.

**Býráðið 30. maj 2024:** 14
Býráðið tók í aðru viðgerð einmælt undir við eykajáttanini.

# 21/24
# 20/00510-33 Broyting av byggisamtykt fyri sethúsaøki á Kambsdali til vinnuøki við serligari flokking.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 14.05.2024 | 16/24 |
| 2 Býráðið | 30.05.2024 | 21/24 |

## Tilráðing

<table>
<tr><td>Til viðgerðar í</td><td colspan="3">Vinnu og havnanevndin</td></tr>
<tr><td>Stutt lýsing av málinum</td><td colspan="3">Býráðið samtykti 29. oktober 2020, at broyta byggisamtyktina fyri øki á Kambsdali frá at verða sethúsaøki til lættari vinna. Í samtyktini var orðingin Lættari vinna nýtt og sambært Innlendismálaráðnum, kann hetta bert gerast um teksturin í byggisamtyktini samstundis verður broyttur, og nærri lýsir hvat hetta merkir. Hetta var orsøkin til at broytingin sum var samtykt og hevur ligið frammi ikki kundi góðkennast. Fyri at kunna fremja hesa broyting, má ein tekstur leggjast afturat tekstinum í byggisamtyktini fyri økispart C-vinnuøki.</td></tr>
<tr><td>Orsøk til at málið verður viðgjørt</td><td colspan="3">Stórur tørvur er á øki til vinnuna á Kambsdali.</td></tr>
<tr><td>Grundarlag</td><td colspan="3">• Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>• Møgulig fylgiskjøl</td></tr>
<tr><td colspan="4" align="center">Viðgerð</td></tr>
<tr><td rowspan="3">Tekstur ið lýsir loysn</td><td>Avleiðingar</td><td>Stuttíðar</td><td>Langtíðar</td></tr>
<tr><td>Fíggjarligar</td><td></td><td></td></tr>
<tr><td>Umsitingarligar</td><td></td><td></td></tr>
<tr><td>Tilmæli</td><td colspan="3">Tekniski leiðarin mælir til at áseting verður sett í sum lýsir hvat Lættari vinna merkir. Eysturkommuna hvur eina flokking av virkjum og virksemi í byggisamtyktini, hendan liggur undir Býarætlan og byggisamtykt.<br><br>Mælt verður til at gerða eitt ískoyti til tekstin fyri øki C-Vinnuøki sum er soljóðandi.<br><br>Lættari vinna</td></tr>
</table>



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

<table>
<tr><td></td><td>

*Umfatar virkir, ið geva orsøk til minni ávirkan á sítt nærmasta umhvørvi og kann staðsetast í øki, har tað eisini eru bústaðir. Virkir í hesum flokkinum eru serliga minni virkir sum ikki hevur við sær larm, lukt ella sjónampar. Tó kann økið verða nýtt til goymsluøki til virkir har tilfar og útgerð kann liggja uttan at órógva og ávirka umhvørvið. Frástøðan til bústaðir, er fyri henda flokk uml. 20 metur.*<br>
*Virksemið skal verða avmarkað til at verða í arbeiðstíð 8-17 og einki virksemi má verða millum 17-8 gerandisdagar.*

Á býráðsfundinum skutu býráðslimirnir Magni Jøkladal og Eyðun á Lakjuni til í staðin fyri orðingina í seinasta reglubroti til heldur at vísa til øki 3 í niðanfyristandandi talvu:

| **Dagur** | **Klokkutíð** | **Tímar** | **Øki 1 dB(A)** | **Øki 2 dB(A)** | **Øki 3 dB(A)** | **Øki 4 dB(A)** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Mánadag til fríggjadag | 07-18 | 8 | 70 | 60 | 55 | 45 |
| Leygardag | 07-14 | 7 | 70 | 60 | 55 | 45 |
| Leygardag | 14-18 | 4 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Sunnu- og halgidagar | 07-18 | 8 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Allar dagar | 18-22 | 1 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Allar dagar | 22-07 | 0,5 | 70 | 60 | 40 | 35 |
| Hámarksvirði | 22-07 | | | | 55 | 50 |

</td></tr>
<tr><td>Dagf</td><td></td></tr>
</table>



**<u>Vinnu- og havnanevndin 14. mai 2024:</u>**
Vinnu- og havnanevndin fylgir einmælt tilmælinum frá tekniska leiðara. Eisini at øki verður avbyrgt frá sethúsaøkinum.

**<u>Býráðið 30. mai 2024:</u>**
Býráðið atkvøddi fyrst um broytingaruppskotið frá Eyðun á Lakjuni og Magna Jøkladal. Býráðið tók einmælt undir við uppskotinum og er uppsoktið tí samtykt við hesum broytingum.

Fundurin lokin kl. 21.00

Dávur Juul

Eyðun á Lakjuni

David Andreasen

Edva Jacobsen

Eivin Breiðaskarð

Gudny Vang

Magni Jøkladal

Ólavur Larsen

Bergtóra Cederiusdóttir

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo